VIÐMERKINGAR

# Mugu fáa at vita, hvat vit hava ráð til ?



**Jákup Petersen**
*yvirlækni*

Viðgerð uttanlands er ikki øðrvísi enn viðgerð innanlands. Yvirlæknar hava ein búskaparligan karm fyri viðgerð innanlands og hann halda vit okkum til. Vit hava eisini karmar at arbeiða innanfyri og politikarnir leggja seg ikki í smálutir. Sama eigur at verða galdandi fyri viðgerð uttanlands.

### Leiðandi yvirlæknin á Landssjúkrahúsinum

Í sosialinum leygardagin 9. Nov. verður leiðandi yvirlækni á Landssjúkrahúsinum Anne Grethe Mikkelsen endurgivin fyri at hava sagt, at politikarnir mugu melda út, hvørji tilboð føroyska heilsuverkið (sjúkrahúsverkið) skal kunna bjóða uttanlands, og hvørjar karmar vit hava at virka undir og at hon sjálv kundi hugsað sær eina tvørfakliga nevnd við læknum, løgfrøðingum og fíggjarligum kønum fólki, at meta um instillingarnar hjá yvirlæknunum. Harafturat verður rættur teirra avvarandi til at fylgja við aftur havdur á lofti.

### Arbeiðsreglur

Í okkara arbeiði sum yvirlæknar hava vit fingið greiðar karmar frá politikarum at arbeiða innanfyri. Tað snýr seg fyrst og fremst um búskaparligar karmar, men eisini um løgtingslóg nr. 89 frá 4. Juni 1996 har arbeiðskarmarnir hjá sjúkrahúsunum í Føroyum verða lýstir. Í somu lóg verða reglurnar fyri viðgerð uttanlands og rættur yvirlækna, at senda sjúklingar av landinum nevndur. Harafturat koma so ymiskar reglur við heimild í lógini.

Vit hava ikki havt stórvegis trupuleikar, at arbeiða undir hesi lóg. Innanfyri búskaparliga karmin hava vit byggt eina kanningarviðgerðar- og røktarketu sum stendur nøkurlunda mát við okkara grannalond. Trupuleikin er meira, at vit ikki hava fingið nakra ábyrgd fyri tí búskaparliga karmi sum er lagdur um viðgerð uttanlands.

### Uttanlandskonto

Tá tað kemur til viðgerð uttanlands so er tann fakliga og tann búskaparliga ábyrgdin fallin í tveir partar, sum sjálvdan tosa við hvønn annan. Hetta hevur verið ein stórur meinboði fyri menningina av tí føroyska sjúkrahúsverkinum.

Sum yvaleyst kunnugt, so er tað Trivnaðarmálaráðið sum hevur tikið fulla ábyrgd av búskapinum í hesum máli og hevur saman við Landsstýrinum sum frægast sett reglur og siðvenju á økinum. Yvirlæknarnir hava so ongan møguleika, at arbeiða við hesi konto. Kunnu ikki taka viðgerðir (og pening) heim, og hava av somu grund torført við, at leggja til rættis framtíðar sjúkrahúsverkið til stóran ampa fyri menningina.

Tvørturímóti er møguleiki fyri at henda konto verður misnýtt. Um bíðitíðirnar eru ov langar í Føroyum ber jú til, at senda sjúklingar av landinum. Í staðin fyri, at seta kostnaðarmiklar viðgerðir ígongd í Føroyum er tað búskaparliga lættari fyri sjúkrahúsið, at lata tær verða liggjandi uttanlands. Um ein deild í Føroyum legst í serlæknaloysi seta vit telemedisin í staðin og spara pening her heima. Hetta og mangt annað gerð at tað er trupult at mennna sjúkrahúsverkið undir verðandi skipan.

### Stýra sjúklingaviðgerð omanífrá

Tað ber ikki til at stýra einari framkomnari sjúklingaviðgerð í smálutum omanífrá. Tað sum í dag er ein miðsavnað viðgerð á einum sentralsjúkrahúsi er í morgin ein viðgerð sum kann fara fram á einum minni sjúkrahúsi ella í heiminum. Nýggjir viðgerðarháttir gerða, at viðgerðir heima knappliga broytast til viðgerðir á stórum sjúkrahúsum. Ambulantar viðgerðir koma og fara. Tað at senda ein blindan sjúkling við sukursjúku og einum beini av landinum til skurðviðgerðar fyri ein hondskaða er ikki tað sama sum, at senda ein aktivan ítróttarmann avstað við sama skaða. Og so tað sosiala, avvarandi, heimliga umstøður, trygdarnet o.m.a. Tað er ikki lætt, at gerða reglur um tílíkt.

Trivnaðarmálaráðið hevur gjørt eftir besta førimuni, men ársaka av manglandi førleika í einum dynamiskum kanningar og viðgerðar høpi, og í eini ørðgrynni av sjúklingalagnum, hevur verið trupult at





noktað, tá yvirlækni ynskir sjúkling av landinum. Uppskotið um, at hava tvørfakliga nevnd í staðin kemur ikki at broyta nakað. Henda nevnd kemur heldur ikki at hava førleika og kemur helst, at virka sum ein grátimúrur sum yvirlæknar og sjúklingar venda sína ónøgd ímóti. Sigur noktar nevndin er vandi fyri, at tað stendur at lesa um tað í bløðunum morgunin eftir.

Annars er viðgerð uttanlands ikki nakað serføroyskt fyribrygdi. Grannalondini hjá okkum eru nú í ferð við at bjóða sínum sjúklingum viðgerð innan alt EF. Hetta sum ein fylgja av felagsskapinum, men ikki minst fyri at fáa egna verkið at spenna seg út í kappingini, og soleiðis mennast. Tey gerða skipanir sum eru við til at stimbra og menna viðgerð í egnum landi, samstundis sum sjúklingum stendur frítt at fara í onnur EF lond at verða viðgørd. Á henda hátt velja sjúklingarnir heldur at verða viðgjørdir í einum vælvirkandi heimlandi og helst nærhendis bústaði sínum.

Sum eg skilji tað er hjá okkum eisini uppskot um, at politikarnir mugu melda út, hvørji tilboð føroyska heilsuverkið skal kunna bjóða uttanlands. Hetta kann eg ikki taka fyri fullt. Kenni eg politikarar rætt hoppa teir ikki uppá henda límpinnin. So skjótt teir fara at leggja seg í smálutir viðvíkjandi viðgerð uttanlands verða kanónirnar vendar frá verkinum og beinleiðis móti teimum, og tað er tað ongin ársøk til.

### Gamal arbeiðsháttur:

Ætlaninar viðvíkjandi viðgerð uttanlands, sum nevndar eru í greinini í Sosialinum leygardagin, minna ikki sørt um tað arbeiðslag sum seinastu árini hevur verið at merkt á Landssjúkrahúsinum. Her meti eg ikki, at leiðslan seinastu árini í nóg stóran mun hevur havt álit á tí væl útbúna starvsfólkinum. Heldur ikki havi eg havt varhugan av, at starvsfólkið formelt og reelt verður tikið uppá ráð sum tað eigur, áðrenn tíðandi avgerðir verða tiknar. Kenslan er meira, at ymiskar loysnir verða smoygdar niðuryvir høvdið á starvsfólkinum, sum síðani vónbrotið arbeiðir víðari so gott tey kunnu, uttan tað arbeiðsgleði og initiativ, sum er so neyðugur lutur í einum so fjølbroyttum virki. Hetta er jú ein arbeiðsháttur sum hini norðanlondini løgdu til síðis fyri einum 20 árum síðani. Men uppskotið viðvíkjandi viðgerð uttanlands ber jú á hetta borðið. Stýring í smálutir omanífrá, nevndir, reglur o.s.fr.

Nevnt verður eisini, at eru trupuleikar við at fáa serlæknar til Føroya. Landssjúkrahúsið hevur eisini mist tveir yvirlæknar seinasta árið. Ein patolog og ein húðlækna og vit fáa helst telemedisin í staðin, sum onga menning gevur til verkið og gerð tað truplult í akuttum støðum. Harafturat er so tryggdin at hugsa um, nú alt skal yvir internetið. Landssjúkrahúsið hevur betri uppiborið.

Her vil eg meina, at arbeiðið við at finna nýggjar læknar hevur verið merkt av trongskygni og manglandi initiativi. Í eini støðu har tørvur er á serlæknum skal annað til enn bert at seta eina lýsing í bløðini. Vit yvirlæknar kenna ein hóp av starvsfeløgum í ymiskum norðanlondum, sum síðani kenna nógvar aðrar. Harafturat eru tað marknaðarkreftirnar, sum eru galdandi við prísi og eftirspurningi. Men vit verða sjálvdan spurdir.

Undir hesum umstøðum tykist tað mær meira sum eina roynd at blása sand í eyguni á fólki, tá nevnt verður at tað skal kannast hvørjar viðgerðir kunnu flytast heim. Har er onki at kanna. Yvirlæknarnir vita fyri langari tíð síðani hvat kann og eigur at takast heim. Men leiðslan kann ikki so mikið sum halda uppá teir yvirlæknar vit hava og enn minni koma við játtanum og útgerð til tað virksemi vit nú hava. Og harafturat er so uttanlands kontoin skipað á ein sovornan hátt, at hon beinleiðis mótarbeiðir heimtøku av viðgerðum. Tær viðgerðir, sum vit hóast allar meinboðar við stríð og strev hava tikið heim, hevur sjálvdan verið stuðlað fyrisitingarliga.

At enda verður mett, at tað er trupult hjá yvirlæknanum at gerða av, um og hvør fylgjari skal verða við sjúklinginum. Nei, tað er ikki trupult hjá yvirlæknunum at vita hvør skal við sjúklinginum. Tað eru yvirlæknarnir sum hava kannað og tosað við sjúklingin og kenna vandan hjá hesum sjúklingi og tað serstaku støðu hesin sjúklingurin er komin í. Tað eru teir, sum hava tosað við avvarandi. Tað eru teir sum kenna tað deild sjúklingurin skal á. Men tað eru onnur sum, eftir framleiddum reglum, skulu taka støðu til, um neyðugt er við fylgjara. Nógvir trupuleikar kundu verið loystir við, at fólkið á gólvinum tekur sær av metingini um fylgjara.

Vit hava sostatt eina trivaliga fyrisiting, sum uttan førleika tekur sær av spurningum sum lættliga og uttan kostnað kundið verið loystir nærri sjúklinginum. Í uppskotinum liggur at vaksa um hesa fyrisiting. Nær fara vit at læra.

### Uppskot

Eg skjóti upp at leggja størsta partin av búskaparligu ábyrgdini viðvíkjandi kontoini til viðgerð uttanlands heilt út til sjukrahúsini - deildirnar. Her kann so sjukrahusið - deildin umsita peningin og leggja langtíðarætlanir fyri viðgerð bæði innanlands og uttanlands. Taka avgerðir um at taka serútgerð og serlæknar til deildina ella taka serviðgerðir heim, fyri at peningurin kann verða brúktur á besta hátt og, at faklig og búskaparlig ábyrgd aftur finnur saman til frama fyri tryggleika og menning í sjúkrahúsverkinum.

ítróttur

Nr. 218 • mikudagur • 13. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nú er tað ordiligt

**Eftir at hann í hálvt annað ár hevur havt lærlingasáttmála vi ensku meistararnar, gerst Ingi Højsted ein verulig kanón, tá hann leygardagin skrivar undir nýggjan yrkissáttmála við the Gunners**

YRKISFÓOTBÓLTUR

*Jákup Mørk*



*Ein spentur Ingi Højsted, tá sáttmálain varð undirskrivaður. Nú er ungi føroyingurin komin eitt stig longur dreyminum*

Sum nevnt í Degi og Viku mánakvøldið, so stendur Inga Højsted nú í boði at fáa veruligan leikarasáttmála við enska stórfelagið, Arsenal. Leygardagurin er ásettur sum dagurin, tá undirskriftirnar koma upp á pláss, og tá hetta er gjørt, kann nú 17 ára gamli leikarin rópa seg fyri fyrsta føroyska leikaran í einum premier-league felagi.

### Ikki lærlingur

Hóast Ingi nú í hálvt annað ár hevur havt sáttmála við enska felagið, so er tað ikki fyrr enn nú, at hann hevur loyvi at gera veruligan yrkissáttmála við felagið. Hetta tí ensku lógirnar áseta, at leikari skal vera fyltur 17 ár, áðrenn veruligur sáttmáli kann skrivast.

Og tað má metast sum einki minni enn eitt bragd, at Ingi nú hevur fingið sáttmálan. Hetta farna árið hevur í stóran mun verið merkt av skaðum fyri hansara viðkomandi, og tí var vandi sjálvandi fyri, at hetta kundi ávirka møguleikar hansara at vinna seg víðari. Í Arsenal hava teir tó eftir øllum at døma mett, at fótbóltsevnini eru somikið stór, at nakað munagott kann spyrjast burturúr.

Júst hvat sáttmálin gevur Inga Højsted í løn komandi árini, er ilt at siga, men tað er lítið at ivast í, at talan eftir føroyskum viðurskiftum er um eina hampuliga góða mánaðarløn.

### B36 fær sín part

Og umframt sáttmálaásettu lønina hjá leikarunum sjálvum, so rennur eisini nakað av peningi inn í kassan hjá barndómsfelagi hansara, B36.

Kristian á Neystabø, formaður í B36, sigur í viðmerking til hetta, at tann spurningurin fyrst og fremst er eitt mál millum B36 og Arsenal.

- Tá upprunaligi sáttmálin varð gjørdur, varð ein langtíðar ætlan fyri allar spurningar eisini teir fíggjarligu – løgd, og tað er so hana, sum vit fyrihalda okkum til, sigur hann. Sjálvandi er tað munur á, um vit selja ein leikara til eitt felag til Arsenal ella til eitt nú Leiftur, men akkurát hvør munurin er, havi eg ikki loyvi at upplýsa. Eg kann bert siga, at talan alla tíðina hevur verið um ein sáttmála, sum vit eru nøgdur við.

Formaðurin vil ikki siga, hvørt nýggja undirskrivingin er eitt lið í hesum sáttmálanum, men tað er helst einki at ivast í, at so er. Tá slíkir sáttmálar verða skrivaðir, er ofta vanligt, at avísar upphæddir verða ásettar, alt eftir hvussu leikarin stendur seg, og tó at talan helst ikki er um nakra munandi upphædd fyri eitt enskt stórfelag, so er lítið at ivast í, at talan er um eitt gott ískoyti til kassan hjá B36.

Kristian á Neystabø leggur tó afturat, at hann er fegin um, at tað gonst somikið væl hjá Inga, at hann nú hevur fingið nýggjan sáttmála.

- Eitt er tann fíggjarligi parturin, men tað er av minst líka stórum týdngini fyri okkum, at tað hepnast væl ítróttarliga. Nú hevur Ingi verið nógv skaddur, men at hann kortini hevur fingið nýggjan sáttmála vísur, at Arsenal sær ein møguleika í honum, og tað er so avgjørt nakað, sum vit frøast um, sigur Kristian á Neystabø at enda.

# Fróði tapti í fyrstu royndini

**Men føroyski landsliðsspælarin fær leygardagin nýggjan møguleika at vísa síni kynstur í Silkeborg**

ROYNDARVENJING

*Jóannes Hansen*

Í hesi vikuni er Fróði Benjaminsen á flatlondum og royndarvenur. Landsliðsmiðvallarin er saman við dananum Anders Nygaard, sum í summar spældi við B68, í Silkeborg, har Viggo Jensen og hansara menn leita eftir styrki til superliguliðið, sum ikki hevur verið serliga sannførandi í heyst.

Mánakvøldið vóru Fróði og Anders á næstbesta liðnum hjá Silkeborg, sum spældi ímóti næstbesta liðnum hjá Horsens. Horsens var á heimavølli, og teir vunnu 4–1. Sambært heimasíðuni hjá Silkeborg var heimasigurin rudduliga uppiborin.

Umframt Fróða Benjaminsen og Anders Nygaard var ein annar gestaspælari á Silkeborg liðnum. Talan var um spælara úr Silkeborg KFUM, sum er áhugaður í at vita, um tað er møguleiki hjá honum at røkka longri sum fótbóltsspælari.

### Nýggjan møguleika

Sambært Silkeborg heimasíðuni so fáa Fróði Benjaminsen og Anders Nygaard aftur leygardagin møguleika at vísa, hvør dugur er í teimum. Tá skal eykaliðið hjá Silkeborg spæla ímóti Køge ella Farum.

Á heimasíðuni varð eftir dystin mánakvøldið skrivað, at tað ímóti Horsens ikki var møguleiki fyri at síggja, hvør dugur er í teimum báðum spælarunum, sum vóru komnir úr Føroyum at royndarvenja.

Fróði Benjaminsen segði við Dimmalætting í gjár, at tað er Frank Skytte, sum mesta partin av farna kappingarárinum var venjari hjá B68, sum hevur skipað fyri, at Fróði Benjaminsen og Anders Nygaard í hesi vikuni royndarvenja í Silkeborg.

Fróði Benjaminsen segði eisini við Dimmalætting, at hóast hann royndarvenur í hesi vikuni, so er hann ikki vísur í, um hann er áhugaður í at spæla fótbólt í Danmark. Men tað valdast sjálvandi um, um hann fer at fáa nakað tilboð frá Silkeborg, og hvussu tað fer at síggja út, um tað kemur á borðið.

Fróði Benjaminsen, sum higartil bara hevur spælt í B68, var kosin ársins spælari í 2001. Í ár stóð hann sterkur í myndini á landsliðnum.